Vikuskiftis Sosialurin


## Mótmæli í Teheran

Fleiri túsund fólk gingu í morgun ígjøgnum gøturnar í iranska høvuðsstaðnum Teheran, har tey søgdu seg stuðla andstøðuleiðaran Mir Hossein Mousavi, sum stillaði upp á forsetavalinum herfyri, men tapti. Franska tíðindastovan AFP skrivar, at fólk veitraðu við grønum bondum, tí grønt var eyðkennisliturin hjá Mousavi í valstríðnum. Sum skilst gekk alt friðarliga fyri seg. Iranar halda í dag ein árligan stuðulsdag fyri tí palestinska fólkinum, og Mahmoud Ahmadinejad, forseti, helt røðu uttan fyri lærda háskúlan.



## Vandi í rúmdini

Í sambandi við ætlaninar um at senda eitt mannað rúmdarfar til gongustjørnuna Mars hava vísindafólk sagt, at ein tílík ferð fer at seta óvanliga stór krøv til ta teknisku útgerðina. Men nú skrivar tíðarritið New Scientist, at ein so drúgv ferð í rúmdeini kann vera sera heilsuskaðilig fyri manningina á rúmdarfarinum. Ferðin til Mars fer at taka 750 samdøgur, og New Scientist skrivar, at tað er stórur vandi fyri, at fólk kunnu fáa krabbamein av at vera so leingi úti í rúmdini við kosmiskari stráling. Sambært NASA eru fleiri rúmdarmenn til reiðar at fara til Mars hóast heilsuvandan.



# Moderna broderí

TÍÐINDASKRIV

Seinnapartin í dag lata ellivu kvinnur upp forvitnisliga framsýning við modernaðum broderíi, baldýring, í Müllers Pakkhúsið.

Síðan september 2007 hevur Føroya Heimavirkisfelag skipað fyri undirvísing í nútíðar broderí við hondarbeiðslæraranum og listakvinnuni Bettinu Andersen.

Tórshavnar kommuna upplýsir, at upplatingardagin verða tær ellivu kvinnurnar, ið sýna fram, lidnar sum broderøsur við útbúgving í modernaðum broderí, baldýring.

Í hesum sambandi er fernisering í Müllers Pakkhúsi fríggjadagin 18. september kl. 17:00 tá Helena Dam á Neystabø, landstýriskvinna í mentamálum, setir framsýningina.

Tær ellivu kvinnurnar, ið nú eru útbúnar broderøsur, eru Karin Andreassen, Annelin Dal-Christiansen, Jórunn Dánialsdóttir, Majken Hammer, Una Højgaard, Oddný í Lon, Edna Niclasen, Fía Petersen, Gunnbjørg Rubeksen, Malan Rasmussen og Malan Rubeksen.

Tær hava fingið eina intensiva og miðvísa undirvísing í nýskapandi broderí. Verkini, sum tær sýna fram, eru broderað við hond og maskinu, og fevna um bæði brúkslist og myndlist. Tøkniliga spenna tær sera vítt – heilt frá siðbundnum til nútíðar eksperimenterandi broderí.

**Upplatingardagin er opið til kl 20:00. Næstu dagarnar verður opið soleiðis:**

Leygardagin 19. sep.10–20
Sunnudagin 20. sep.14–20
Mánadagin 21. sep. 10–20
Týsdagin 22. sep. 10–20
Mikudagin 23. sep. 10–20

Á myndini síggjast fýra av teim ellivu nýútbúnu broderøsunum, ið sýna fram í Müllers Pakkhúsið. Frá vinstru eru tær Fía Petersen, Jórun Dánialsdóttir, Karin Andreassen og Majken Hammer, sum eisini er forkvinna í Føroya Heimavirkisfelag.

# Senda sjokkbylgur inn í føroyska heilsuverkið

**- Tað er óhaldbart fyri sjúklingar, starvsfólk og menning í føroyska sjúkrahúsverkinum, at Landsstýrið enn eina ferð leggur upp til skerjingar á Landssjúkrahúsinum, har ótryggleiki aftur valdar**



SKERJINGAR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Kaldur ótryggleiki valdar á Landssjúkrahúsinum. Tað staðfestir Vár í Gong, forkvinna í Felagnum føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

Hon sipar til tosið herfyri um, at stórar sparingar skulu setast í verk, men hon fegnast tí um, at ein eykajáttan, sum munar, er á veg,

Hon lýsir støðuna í landssjúkrahúsinum við tveimum orðum: Kaldur ótryggleiki!

- Aftur og aftur verða sjokkbylgjur sendar inn í føroyska sjúkrahúsverkið. Fráboðanirnar eru skaðiligar og langtíðarárini eru álvarslig. Menningin av viðgerð og –røkt, fær stóran skaða og steðgar upp, sigur Vár í Gong, formaður í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktararfrøðingar.

- Úrslitið er, at føroyskir sjúklingar í seinasta enda ikki fáa nøktandi heilsutilboð, ið hoyrir heima í einum hvørjum vælferðarsamfelag. Tað er ein sera álvarslig støða, sigur Vár í Gong.

- Um tað gerst neyðugt, mugu stig takast til at eftirmeta og kannað viðurskiftini á virðiligan hátt. At fremja sparingar í óðum verkum er ikki loysn, sigur Vár í Gong, formaður í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

- Visiónin er, at sjúklingurin skal vera í fokus, men aftur í ár er fokus einamest á sparingar og skerjingar. Tað er óhaldbart, sigur Vár í Gong.

# MBF ráðstevna í Norðurlandahúsinum 8. oktober

**ST – sáttmálin um vernd og rættindi teirra brekaðu**
**Frá at vera sosialur klientur til at vera ábyrgdin hjá øllum**

TÍÐINDASKRIV

Hósdagin 8. oktober skipar MBF fyri ráðstevnu í Norðurlandahúsinum. Ráðstevnan er tann seinasta ráðstevnan av trimum, ið MBF hevur skipað fyri, í samband við, at ST sáttmálin, - um vernd og rættindi teirra brekaðu, skuldi setast í gildi í Føroyum. Tað er tí at fegnast um, at Føroya Løgting í summar endaliga samtykti at seta ST sáttmálan í gildi í Føroyum.

Ráðstevnan fer at snúgva seg um "Sektorábyrgd". At vit hava valt at varpa ljós á hettar evnið kemst av, at vit halda, at ein avgerandi treyt fyri at sáttmálin kann virka eftir ætlan er, at allir myndugleikar, skipanir og annað virksemi, ið hava ábyrgd av at lata veitingar og tænastur til borgarar, hava tilsvarandi ábyrgd av at tryggja og fíggja, at hesar veitingar og tænastur eisini eru atkomuligar fyri fólk, ið bera brek.

Við at viðgera hendan spurning á ráðstevnuni er tað okkara vón at myndugleikar og fólk annars taka hettar til sín og harvið vónandi verða við til at flyta mørk, viðvíkjandi hesi hugsan.

Til ráðstevnuna hava vit fingið nógvar áhugaverdar persónar at halda fyrilestur. Mogens Wiederholt, fyrrverandi stjóri á Center for Ligebehandling af Handicappede og núverandi stjóri í danska Spastikarafelagnum fer at greiða frá, hvussu ST sáttmálin kann nýtast handicappolitiskt og hvussu sáttmálin spælir saman við og styrkir sektorábyrgdina. Onnur, ið fara at greiða frá verða Almannastjórin Petra J. Joensen um sektorábyrgd og almannaverkið, Jákup Foldbo deildarleiðari í Runavíkar kommunu, um kommunala økið og sektorábyrgd, Barbara á Tjaldrafløtti, forkvinna í Ráðnum fyri brekað, um hvussu vit røkka sektorábyrgdini, Bergljót av Skarði avvarðandi um, hvussu tað er at liva við breki í føroysku skipanini og Hallbera F. West um meginregluna um kompensatión, við atlit til føroysk viðurskiftir.

Ráðstevnan er ætlað øllum áhugaðum, men serliga er tað okkara vón, at landsog kommunalpolitiski myndugleikin verður væl umboðaður umframt fólk, sum gjøgnum teirra virki eru tengd at og hava ávirkan á, at ásetingarnar í ST sáttmálanum verða fylgdar og soleiðis eisini eru partur av at sektorábyrgdir verður fylgd. Fólk annars, ið hava áhuga í evninum eru eisini vælkomin.

Fleiri upplýsingar og skrá verða lýst í fjølmiðlunum um miðjan september.

Vanlig hugsan er, at fólk í bera brek eru sosialir klientar. Hesin hugsunarháttur er als ikki í tráð við nútíðarhugsan. Fólk ið bera brek eiga at verða fevnd av júst somu skipanum sum allir aðrir føroyingar. Tí er umráðandi, at meginreglan um sektorábyrgd verður galdandi.

**MBF**